# Oljuvirksemið við miðlinjuna økist í hvørjum

Um somu tíð sum ein løgtingsnevnd viðgerð eitt uppskot frá landsstýrinum um at loyva seismiskum kanningum á føroyskum øki og ein føroysk sendinevnd fyrireikar seg at fara til London at viðgera marknatrætuna við bretar fer fram óvanliga nógv virksemi beint eystan fyri føroyska fiskimarkið.

Fýra til fimm seismisk skip frá fleiri seismiskum fyritøkum hava arbeitt í økinum fyri fleiri av heimsins størstu oljufyritøkum, eitt nú BP og Amerada Hess. Harumframt er nú ein av heimsins mest framkomnu royndarboripallum komin til økið at bora.

## Økt virksemi

Virksemið er úti á kantinum á Hetlandsrennuni bert einar 10 fjórðingar frá føroyska markinum ella einar 160 fjórðingar úr Akrabyrgi. Talan er um linsensblokkin bretsku megin miðlinjuna, sum eitur 204. Tað var í hesum blokkinu, at BP í fjør gjørdi eitt sensationelt oljufund. Amerikanska fyritøkan Amerada Hess rakti eisini við eina oljukeldu stutt hagani.

Eftir hesar kollveltandi og heilt óvæntaðu uppdagingar broytti bretska stjórnin mannagongdina í lisensskipan tess, soleiðis at BP og Shell alt fyri eitt fingu loyvi til at fara undir veruligar kanningar við oljuframleiðslu fyri eygað.

Tað eru hesi góðu fundini, sum nú eru orsøkin til, at eini fimm seismikkskip hava gjørt kanningar í økinum alt summar, og at ein av heimsins best útgjørdu boripallum nú er á veg til økið.

## Kundu ikki fjala gassloga

Hóast oljuídnaðurin er ein afturlatin heimur og alt verður dult sum mansmorð, so er ilt at fjala út yvir alt. Hetta máttu BP sanna í fjør, tá manningin á Smyrli kom fram við boripallinum "Ocean Alliance", har gasslogin stóð upp í loft - prógvið um, at bretar høvdu funnið olju og gass. Hetta fundið varð rættuliga sensationelt, tí ongar seismiskar kanningar vóru gjørdar í økinum frammanundan.

Komandi dagarnar fer ein líknandi pallur "Ocean Valiant" at bora í sama økinum men nakað burtur frá holinum, har olja spríkti upp úr í fjør. Seismisku kanningarnar, sum gjørdar eru í summar, vísa nú vegin til henda pallin og fara helst mong eygu í oljuídnaðinum at vera vend móti hesi boring komandi dagarnar.

Veturin nærkast og tað er greitt, at bretar hava skund. Spurningurin er nú, um Smyril verður eins heppin hesaferð at koma fram á boripallin, meðan gasslogi stendur upp í loft, sum hann var tað í fjør. Tá var tað nærum av tilvild. Ella hvør veit: kanska landsstýrið, vaktartænastan ella onnur triði fer at fylgja við, hvat henda nýggjasta boringin fer at vísa.

jan




# Bretskur olju-"bossur" vitjar

Ein hin fremstu maðurin í bretskari oljuvinnu kemur í næstum til Føroya. Tað er John d'Ancona, ovasti stjórin í OSO, sum stendur fyri Offshore Supply Office. Hetta er almenna høvuðsfelagið innan bretska oljuvinnu og er stjórin hjá sama d'Ancona eingin minni enn sjálvur orkumálaráðharrin Eggert.

Tað var á altjóða oljuframsýningini í fjør, at táverandi føroyski orkumálaráðharrin Svend Åge Ellefsen bjóðaði d'Ancona at koma til Føroya. Hesin tók av innbjóðingini og varð ætlanin, at hann skuldi vitja í summar. Men landsstýrið ynskti at útseta vitjanina til í vetur, og nú er dagurin so ásettur. D'Ancona kemur til Føroya 15. november. Við sær hevur hann 12 fólk, sum hvør í sær umboða allar partar av bretskari oljuvinnu. Her er m.a. talan um tey ovastu handilsfólkini innan oljuvinnuna.

Tað skilst, at bretar eru sera hugaðir at tosa við føroyingar við tí fyri eygað at leggja lunnar undir eitt komandi samarbeiði á oljuøkinum. Seinastu oljufundini á markinum millum bæði londini hava eisini økt um áhugan fyri einum miðvísum samarbeiði.

jan

*Peter Philip frá Geco-seismikkfyritøkuni:*

# Oljan av besta slag

*-Eg skilji væl, at BP nú skundar undir kanningarnar í økinum vestan fyri Hetland, tí oljan teir funnu har í fjør var av besta slag sigur Peter Philip frá seismikfyritøkuni Geco, sum í summar hevur gjørt kanningar fyri amerikanska felagið Amerada Hess á júst somu leiðum, har bretar nú fara at bora*

Nú bretar hava gjørt av at gera eina nýggja royndarboring í økinum nærhendis føroyska markinum hava vit spurt stjóran í heimsins størsta seismikkfelag, Peter Philip, sum herfyri varð í Føroyum, um hann er bilsin av, at BP - longu áðrenn seismisku kanningarnar eru lidnar, fer undir enn eina royndarboring í økinum!

-Eg eri ikki so bilsin av hesum, tí keldan BP fann í fjør var rættiliga einastandandi. Olja varð av tí besta kvalitetinum og løtt at fáa upp. Mær er sagt, at manningin á einum føroyskum ferðamannaskipi sá loga á boripallinum í fjør, og tað sigur rættiliga nógv.



## That Is the case

Peter Philip heldur seg skilja, at BP ynskir at koma víðari so skjótt til ber. Vit spurdu hann, um hetta at bretar longu eitt ár eftir, at teir funnu eina oljukeldu í økinum, fara at royndarbora aftur, merkir, at teir hava funnið eitt sera áhugavert oljuøki?

-Yes, I am sure that, that is the case. Ja er eri vísur í, at hatta er støðan. Eg ivist onga løtu í, at BP heldur, at hetta er eitt sera áhugavert øki

Vanliga tekur tað fleiri mánaðir at kanna og viðgera seismiskar upplýsingar. Í hesum førinum kann eyka orka verða sett inn - eitt nú við at taka í brúk nógv EDV-útgerð og harvið fáa úrslitið rættiliga skjótt. -Men seismiskar kanningar er eitt rættiliga umfevnandi fakøki, so tað er helst ikki rætt at gera ov skjótar niðurstøðu bara útfrá, hvussu skjótt tað gongur. Tað kann eisini vera, at BP ynskir at gera eina boring, áðrenn veturin kemur. Men tað er ikki óvanligt at skunda undir alla gongdina, tá tú hevur sæð okkurt áhugavert í einum øki leggur Peter Philip afturat og vísir til dømi um hetta, tá teir arbeiddu í Vietnam.

## Arbeiða fyri amerikanskt felag

Nú er tað so, at eitt av skipunum hjá fyritøkuni, sum Peter Philip arbeiðir fyri, hevur gjørt seismiskar kanningar fyri amerikanska felagið Amerada Hess í júst sama øki sum BP hevur funnið olju. Vit spurdu hann tí, um ikki fyritøka hansara Geco longu hevur nógvar áhugaverdar upplýsingar um økið og um hetta ikki eisini er orsøkin til, at fyritøka hansara er so áhugað í at gera kanningar inni á føroyskum øki eisini?

Til tað sigur hann, at talan er um sølu av upplýsingum, og tí kann hann ikki siga nakað. Heldur ikki hevur hann loyvi til at brúka upplýsingarnar, sum teir hava skaffa Amerada Hess, til at siga føroyingum, at økið her møguliga eisini kann vera áhugavert.

-Eg havi tagnarskyldu mótvegis kunda okkara. Men ein sannroynd er tað kortini, at vit fegnir vilja sleppa at gera seismiskar kanningar við Føroyar leggur Peter Philip afturat.

jan